# Uppskot til játtanarkarmar fyri 2012

Tíðindafundur 31. mars 2011

# Játtanarkarmurin fyri 2012

- Høvuðsfortreytin fyri samlaða játtanarkarmin í 2012 er, at hallið á fíggjarlógini fyri 2012 ikki skal vera størri enn 450 mió. kr.
- Henda fortreyt varð longu sett av Løgtinginum fyri einum ári síðan, tá Løgtingið eisini samtykti, at fíggjarlógarhallið skal minkast stigvíst soleiðis, at tað verður heilt burtur í 2015.
- Endamálið við at fáa hallið burtur er at steðga vøkstrinum í landskassa-skuldini.

# Fyritreytir

- Rakstrarútreiðslurnar eru framskrivaðar við 2011-prísum, men landsstýrið er tó samt um, at verða lønar-sáttmálarnir broyttir, verður útreiðslukarmurin broyttur tilsvarandi.
- Inntøkurnar eru eisini framskrivaðar við støði í 2011-prísum. Hetta merkir, at hædd er ikki tikin fyri prísvøkstri. Verður útreiðslukarmurin hækkaður vegna sáttmála-hækkingar, verður inntøkumetingin hækkað sam-svarandi.

# Fyritreytir

- Grundarlagið fyri framskrivingini av rakstrarútreiðslunum er, at virksemið verður hildið á júst sama støði sum í dag, tó soleiðis, at hædd er tikin fyri komandi broytingum.
- Dømi um framskrivingar eru t.d. demografiska gongdin innan eldraøkið, dýrkandi heilivágurin og tali av skúlanæmingum.
- Eisini er hædd tikin fyri tiltøkum, sum politisk avgerð longu er tikin um at fremja, t.d rakstur av ellis og røktarheimum í gerð og uppstiging av tyrlutilbúgvingini.

# Fyritreytir

- Landsstýrið hevur ásannað, at fyri at røkka málinum at fáa hallið á fíggjarlógini burtur í 2015, mugu rakstrarútreiðslurnar ikki vaksa meira enn 1% árliga.
- Hetta merkir, at neyðugt verður við sparitiltøkum komandi árini. Skulu nýggjar raðfestingar gerast hesi árini, mugu enn fleiri sparingar gerast.

# RLÚ-úrslitið í 2012

- RLÚ-úrslitið verður mett til eitt hall á 429 mió. kr. í mun til 546 mió. kr. í fíggjarlógini fyri 2011
- Í mun til BTÚ verður hallið 3,3 % í 2012 móti 4,3 í fíggjarlógini fyri 2011

# Gongdin í útreiðslum

| | |
|---|---|
| Rakstrarútreiðslur byrjan | 4.529 mió. kr. |
| - Framskrivingar | 88 mió. kr. |
| - Ætlað tiltøk í árinum | -42 mió. kr. |
| Rakstrarútreiðslur tils. | 4.575 mió. kr. |

# Gongdin í inntøkum

| | |
|---|---|
| Inntøkur byrjan | 4.257 mió. kr. |
| - Framskrivingar | 230 mió. kr. |
| - Ætlað tiltøk í árinum | 26 mió. kr. |
| Inntøkur tilsamans | 4.513 mió. kr. |

# Gongdin í løguútreiðslum

- Løgukarmurin í 2012 er settur til 280 mió. kr. í mun til 234,7 mió. kr. í fíggjarlógini fyri 2011.

# Høvuðsraðfestingar

- Høvuðsraðfestingarnar í 2012 fara til barnafamiljurnar, útbúgvingarøkið og tilbúgvingina.
- Løgurnar til skúla-, almanna- og heilsuverkið verða eisini øktar munandi, samstundis sum peningur er settur av til nýtt havrannsóknarskip.
- Innan almenna bygnaðin verða rationaliseringar og sparingar framdar við at minka talið av aðalráðum úr nýggju niður í seks, og at javnseta løgtingslimir og landsstýrisfólk við aðrar borgarar, tá ið tað snýr seg um endurgjald fyri ferðaútreiðslur.

Spurningar